**SJAVSKAPPING**
Verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.45.
LÍF

## Súkklur

**SKUTARAHJÁLMUR TIL SØLU**
Svartur skutarahjálmur til sølu. Brúktur nakrar fáar ferðir.
Tlf. 310358/259358

**TVEIR SKUTARAHJÁLMAR TIL SØLU**
Stødd M og XL.
Tlf. 260591 Lív

**EIN 50C ZUZUKI**
motor cross til sølu fyri 10.000 ella umbýti við ein skutara.
Tlf. 527130/327130

**TIL SØLU**
Tunset 80cc til Yamaha jog og Aprilla sonic. Krumtappur 16000 umd. við leiðum 80 cc. Cylindari úr alm. til sølu vegna feilkeyps. Um hóskandi boð fæst.
Tlf. 509756

**KNALLERT TIL SØLU**
Yamaha fs1 knallert til sølu fyri 8000 kr. Súkklan er í sera góðum standi.
Tlf. 561104

**GUL KAPPSÚKKLA**
14 gear, 28" 1.000,- kr. Ein súkkla er góð jólagáva, hóast brúkt.
Tlf. 225013/316328

**FJALLASÚKKLA**
26'', 21 gear, alustell, bert 1.000 kr.
Tlf. 225013/316328

**APRILIA RX50 TIL SØLU**
fyri kr. 17.000,- árg. 11/2002, í sera góðum standi, v/ eykalutum.
Tlf. 262906

**PEUGEOT VIVA CITY**
skutari til sølu. Sær væl út og koyrir væl. Er einans 1 1/2 ára gamal við nógvum eykalutum, fyri einans 10.000 kr. ella hægstbjóðandi.
Tlf. 259224

**YAMAHA AEROX**
skutari til sølu. Er frá august 03.
Tlf. 210499

**TIL SØLU**
Ein Honda X8RS skutari til sølu fyri hægstbjóðandi, prísur undir 14.000 ongan áhuga. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 257149 eftir kl. 16

## Teldur

**TELDA TIL SØLU**
Ein + inter´celeron 2200 við 256 mb 80 gigabeit hardisk128 mb grafikkkort on boardljóð CDRW 52x24x52 brennari Onboard lan 10/100. Windows xp tastatur mús og skermur. Tvey spøl fylgja við. Fifa 2005. Hause of the dad 2.
Tlf. 333219/260019

**PLAYSTATION 2 SPIL TIL SLAG**
Bl. a. Driv3r, Max Payne, Stuntman og The Sims, frá 200 kr. Ring og hør nere.
Tlf. 224220

**DELL TELDA**
Dimension 4500, Intel 2,54 Ghz-Pentium 4, 1024 MB DDR-Ram, 333 Mhz PC2700, 160 GB Ide harddisk (7200 RPM) 10 x DVD, 48 x cd-brennara, grafikkort, radeon 128 MB, TV-out, 19" Dell M992 skerm, Windows XP Home, 1 1/2 ára gomul (3 ára garanti) fantastisk spælitelda, til sølu fyri ca. 8.000,- kr.
Tlf. 264955

**PLAYSTATION I**
til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 322850

**PLAYSTATION I**
við joystik. Bíliga til sølu.
Tlf. 310473

**TELDA TIL SØLU**
AMD Athlon 1500+, 512mbram, GeFroce3, 80gb, DVD-brennari 4x, SB live ljóðkort, við 19" skerm. Fyri kr 5000,-
Tlf. 271982

**PARABOL**
so gott sum nýggjur, til sølu fyri 1.000 kr. Skálin er 1 metur, við fylgir eitt LNB høvdi við 0.3 DB.
Tlf. 315723

**PARABOL ÚTGERÐ**
Reciever til sølu, 1 stk. Satellite Positioner bíliga til sølu.
Tlf. 314089

**PC-SPØL TIL SØLU**
2 nýggj pc-spøl til sølu. 1 stk. Port royale kr. 100,- 1 stk. Simcity 4 100,- kr.
Tlf. 314089

**CD-BRENNARI TIL SØLU**
fyri 450,- Nýprísur 725,- Sera lítið brúktur. Nero brenni-program fylgir við.
Tlf. 263880

**BÍLIGA TIL SØLU**
Fartelda bíliga til sølu.
Tlf. 0045 60681963

**4 IN 1**
Flott kabinet við 400 watt streymforsýning + mús, knappaborð og hátalarar, til sølu vegna feilkeyp fyri 650,- kr.
Tlf. 274343

**PLAYSTATION II SPØL**
til sølu. Age of Empires II og Onimusha Warlords 250 kr. stk. + 4 ttelduspøl 50 kr. stk.
Tlf. 504128

**FARTELDA TIL SØLU**
Dell Inspiron 8600 Pentium-M 1.6 GHz, 512 MB DDR Ram 333, 60 GH Hdd, 128 MB Radeon 9600 Pro Turbo, 15" Widescreen, tráðleyst Lan Win XP Pro, Works 7.0 Vælegnað til spøl. 10 mðr. garanti, 12.000 kr.
Tlf. 266172

**FARTELDA TIL SØLU**
Fartelda, sera vælegnað til lesandi, til sølu, við nógvum tilhoyri. Farteldan er av merkinum Amilo hjá Fujitsu Siemens. Hon hevur 2.40 GigaHertz, 288 MegaHertz og 248 MegaByte RAM. Harddiskurin er á 40 GigaByte. Við í keypinum fylgir eisini ein HP litprintari og eitt HP digitalt kamera. Tráðleys mús, teldutaska, spøl og fleiri programm fylgja eisini við. Samlaður prísur fyri alt, einans 12.000 kr.
Tlf. 514716

**TELDA TIL SØLU**
Pentium 4, 3 THz processari, 1024 MB Ram, 17" flatskerm, tráðleys mús/tastatur, Windows XP professional, DVD-brennari, sum nýggj, 9.000,- kr.
Tlf. 283568

## Tónleikur

**GUITARI YNSKIST**
Um tú umhugsar at selja tín (brúkta, helst lítla) kassaguitara, vinarliga ring til mín á
tel. 507701 ella 311581 eftir kl. 18

**STEREOANLEGG TIL SØLU**
Ein Kenwood KA-5050R forsterkari, ein Kenwood DP-1080 cd spælari og einir Dali 109 hátalarar. Til søluf yri 10.500 kr.
Tlf. 213335

**EL-GUITAR YNSKIST**
Má vera í fínasta standi, lættur at spæla upp á (smalan háls) og hava tremolo-arm. Nýprísur: minst 12.000 kr.
Tlf. 224059 eftir kl. 17

**BILANLEGG TIL SØLU**
Ring og hoyr nærri.
Tlf. 220626

**TIL SØLU**
Ein premier dupult fóttrummu pedal fyri 1300 kr.
Tlf. 582666

**EIGUR NAKAR**
ein brúktan, bíligan kassaguitara at selja mær?
Tlf. 266698

**HÁTALARAR TIL SANGANLEGG**
2 Wharfedale Lix-15 FR 3-vegis hátalarar við 15" bassi, 350 watt, lítið brúktir, seljast fyri 1/2 prís, evt. við 18" subbassi.
Tlf. 421419

**GUITAR**
Paul-Reed-Smith ES »Soapbar« bíliga til sølu.
Tlf. 421419

**TIL SØLU**
Ein flottur Yamaha guitari til sølu v/ forsterkara, forsterkarin er 90 watt, nýprísur 9.500 kr. Prísuppskot: 6500 kr.
Tlf. 261554

## Út- & Sjónvarp

**TIL SØLU**
Medion DVD-RW optager til salg, 2.000,-kr. nypris: 3.999,- kr.
Tlf. 448506

**PHILIPS**
Philips stereoanlegg, nýprísur 6.500 kr. til sølu fyri 3.500 kr.
Tlf. 581544

**TELEVARPSMÓTTAKARI**
ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 503249

**27'' SJÓNVARP OG VIDEO**
til sølu fyri 5.000 kr. tilsamans.
Tlf. 224804 ella 211015

## Ymiskt

**VAKSTRARHÚS TIL SØLU**
Húsið er 1200 fermetrar. Áhugað kunnu venda sær til
Tlf. 211853

**TIL SØLU**
Fjarstýrt modelflogfar og fjarstýrdur bátur og bilur til sølu. Tveir motorar til modelflogfar fylgja við og tvær kompl. fjarstýringar. Bíliga til sølu.
Tlf. 267656

**GARAGUHURÐ**
Brúkt 212x248, til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 441586

**YNSKIST**
Tvey góð vindeygu b. 80, l. 110, ynskjast bíliga.
Tlf. 253211

**PARABOL TIL SØLU**
Parabol við móttakara bíliga til sølu.
Tlf. 583388

**YMIST TIL SØLU**
Solarium (24 rør) 2.000,- Flymro 330 plenuklippari 800,- Hornaeimhetta við motor 1.000,-
Tlf. 421789

**PARABOLUR**
100 cm. í diametur við spildurnýggjum høvdi.
Tlf. 421074/503074

**GRUNDØKI TIL SUMMARHÚS**
Søkt verður eftur grundøki til summarhús í Vágoy/Streymoy/Eysturoy. Ein 15 MD Toyota Avensis ST aut gear skal ganga inn í keypið. Um hettar hevur tín áhuga kunnu vit altíð tosa um ein prís.
Tlf. 316310 / 215960

**PERFEKT JÓLAGÁVA!**
Bið hana klappa í og hon ger tað. 2 mánaðar gomul Samsung SGH-P510 við elektroniskum klaffi, í eskju. Lítið og onki brúkt. Við fylgir ladari, 2 battarí og eitt ára garanti.
Ring ella skriva sms til 506407

**YNSKIST**
Ein træ ella plastik úthurð ynskist til keyps fyri rímuligan prís. Eingin rútur má vera í.
Ring 514717, Mourits

**JÓLAPAKKAR TIL ESBJERG**
Eg kann taka jólapakkar við til Esbjerg 16. desember. Tó ikki frystigóðs.
Tlf. 423177/723177

**TIL SØLU**
Koparrør 10 mm – 103 cm. 1 stk. 4" rør gult, l. 2,07 cm. 1 stk. 4" rør grátt, l. 57 cm. 1 stk. 4" bend 45°, 2 stk. 4" bend 67°, 1 stk. 4" bend 15°, 1 stk. niðurløp, 1 stk. hvítt úr vask, 2 stk. t-rør til vask, stødd 40 x 88,5 til sølu, alt fyri 300 kr.
Tlf. 271723

**STÓRIR MÁLNINGAR**
Ein málningur eftir Sigmund Petersen, ein málningur eftir William Smith og eitt stórt litografi eftir Jack Kampmann til sølu.
Tlf. 448271

**HASLE KLINKUR**
Um nakar eigur nakrar fáar reyðbrúnar Hasle klinkur 19x19 cm at selja mær er køkur mín bjargaður!
Tlf. 315286

**FLYTIHJÁLP YNSKIST!**
Søkt verður eftir plássi í bingju/flytibili í samb. við flyting til Danmarkar/Hørsholm um ársskifti.
Vinarliga ring á tlf. 514808

**MOTOROLA V500**
Fartelefon við kamera, Bluetooth, Java, MMS, kalendara, litskerm og mangt annað. Til sølu fyri einans 1.400 kr.
Tlf. 0045 26275314

**ÁRLIGA ÚTSØLAN**
hjá Dagsglæmuni í Vági verður fríggjadagin 10. desember kl. 16.00.
Meinigheitshúsið

**TAKVINDEYGA**
Stødd uml. hædd 70 cm. br. 55 cm. bíliga til sølu.
Tlf. 503249

**JÓLAKORTINI FRÁ GIKTAFELAG FØROYA**
eru komin. Limir í felagnum kunnu keypa tey við at venda sær til skrivstovuna tlf, nr. 31 02 37 týsdag og hósdag kl. 13.00 til 16.00 ella við telduposti gikt@gikt.fofyri 10,00 kr. stk við brævbjálva.
Giktafelag Føroya

**2 TERMOVINDEYGU**
1 stødd uml. hædd 130 cm. br. 110 cm. 1 stødd uml. 130 x 130 cm. bíliga til sølu.
Tlf. 503249

**TRAPPA**
Brúkt loftstrappa, bein, longd 3-4 mtr. timbur ella stál, ynskist til keyps. Bert brúkast fyribils.
Tlf. 314492/215606

**CD-WALKMAN**
við fjarstýring og tasku til sølu. So gott sum nýggjur. Nýprísur 1.500,- Kostnaður 800 kr.
Tlf. 514021, Kristmund

**TIL SØLU**
Høglbyrsa cal. 12, er í góðum standi, prísur 1.500 kr.
Tlf. 421433

**NOKIA TLF. TIL SØLU**
Tvær Nokia mobiltelefonir til sølu. Ein lítið brúkt Nokia 5210 og ein heilt nýggj Nokia 3310 til sølu fyri 500,- kr stk. Ladari fylgir við báðum telefonunum.
Tlf. 32861312 ella 26394786
mail: uniklas@hotmail.

**VINDEYGU TIL SØLU**
9 træ-vindeygu 120 x 120 til sølu.
Tlf. 421002/721002

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Jólaveitslan verður leygardagin 11. des. kl. 17. í bygdarhúsinum í Hósvík. Bussarnir koyra sum vanligt. Til ber at tekna seg hjá onkrum í nevndini í seinasta lagi 5.des. kostnaður 120 kr. Minnist til jólapakka.
Nevndin




# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

FYRILESTRAR
*Tíðindaskriv*

Fróðskaparsetrið og Føroya Fróðskaparfelag skipa í vetur í felag fyri fyrilestrarøð um náttúruvísindi undir yvirskriftini 'Myndlar og tøl'. Annar fyrilesturin í røðini verður hóskvøldið 9. desember, tá ið Hans Pauli Joensen, lektari í alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum heldur fyrilesturin *"Geislavirkni í Føroyum– frá fjarskotnum bumbum og kjarnorkuverkum"*.

Tær fyrstu mátingarnar av geislavirkni í Føroyum vórðu gjørdar fyri meir enn 40 árum síðan og mátingar verða framvegis gjørdar í føroysku náttúruni. Í fyrilestrinum fer Hans Pauli Joensen at greiða frá hesum kanningum og úrslitum teirra.

Eldru mátingarnar av seyðakjøti vísa í einstøkum førum, at nøgdirnar av cesium-137 vóru omanfyri markvirðið, ið myndugleikar ásettu fyri kjøt til matna eftir kjarnorkuvanlukkuna í Tjernobyl í 1986. Tíverri er ongin staðfesting av, hvaðan í landinum kjøtið er fingið. Í dag eru nøgdirnar púra vandaleysar.

Mesta dálkingin í mjólkini varð staðfest í 1964. Tá vóru nøgdirnar av cesium-137 í føroysku mjólkini væl størri enn í t.d. fleiri arktiskum økjum. Dálkingin minkaði, eftir at royndirnar við kjarnorkuvápnum í atmosferuni hildu uppat. Í 1986-87 var dálkingin aftur næstan líka stór sum fyrst í 1960'unum, orsakað av Tjernobylvanlukkuni, men minkaði tó skjótt aftur.

Geislavirknu evnini eru eisini í havinum, serliga koma tey frá kjarnorkuverkum. Kanningar frá 1990-unum hava givið ábendingar um, at cesium-137 er komið í føroyskan sjógv frá kjarnorkuverkinum í Sellafield í Onglandi. Farleiðin frá Sellafield er long og drúgv. Geislavirknu evnini verða førd við teimum stóru havstreymunum, og teir ganga ikki beint úr bretskum øki inn í føroyskan sjógv. Nøgdin av dálkandi geislavirknum evnum í sjónum um okkara leiðir er tí tynt munandi í mun til upprunastaðið, tí er sera lítið av geislavirknari dálking í føroyskum sjógvi. Miðskeiðis í 1990-unum vóru stórar nøgdir av geislavirkna evninum technetium-99 leiddar út í Írska Havið frá Sellafield verkinum, og tí verður nú støðugt fylgt við, um nøgdirnar av hesum evninum broytast um okkara leiðir.

Hans Pauli Joensen er útbúgvin cand. scient. í alisfrøði og støddfrøði frá Odense Universiteti í 1980. Hann starvast sum lektari í alisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Seinastu mongu árini hevur hann verið megindeildarleiðari á Náttúruvísindadeildini.

### Skráin fyri fyrilestrarøðina er hendan:

9. desember 2004
Hans Pauli Joensen: *"Geislavirkni í Føroyum– frá fjarskotnum bumbum og kjarnorkuverkum"*

6. januar 2005
Øystein Patursson: "Aliringar til harðbalin økir" – *um at menna aliútgerð.*

27. januar 2005
Uni Danielsen: *"Seismiskar kanningar á Glyvursnesi"*

17. februar 2005
Knud Simonsen: *"Streym til drív- og leitiskipanir á landgrunninum"*

10. mars 2005
Trygvi Vestergaard: "Hvat anda vit?" – *um úrslit frá luftkanningum í Føroyum*

31. mars 2005
Bárður Niclassen: "Spæla alda og streymur saman á landgrunninum"

21. apríl 2005
Eyðfinn Magnussen: "Føroya Banki – eitt vakstrarparadís hjá fiski."



*Hóskvøldið 9. desember heldur Hans Pauli Joensen, lektari í alisfrøði á Náttúruvísindadeildini, fyrilesturin "Geislavirkni í Føroyum– frá fjarskotnum bumbum og kjarnorkuverkum"*